# Kommunala umskipanin

**Stýrissamtykt viðvíkjandi uppskotum um kommunala umskipan.**

*Hóast einstøku kommunustýrini ikki endaliga hava viðgjørt uppskotið um kommununala umskipan, so hevur stýrið fyri Kommunusamskipan Føroya í fleiri umførum við stórum áhuga viðgjørt álitið.*

*KSF hevur í skrivið til landsstýrið hin 6. november 2009 áður boðað frá, at*

- umskipanin ikki eigur at verða sett í verk fyrr enn 1. januar 2013

- tíðarætlan fyri umskipanina eigur sum skjótast at verða samtykt av løgtinginum soleiðis, at talan er um skipaða heildartilgongd
- løgtingssamtyktin er prinsippiel politisk avgerð um høvuðsættirnar í umskipanini soleiðis, at landsstýrið og kommunurnar greitt vita,
  - hvørjar uppgávur skulu leggjast til kommunurnar,
  - hvussu hesar skulu fíggjast, og
  - hvussu kommunali bygnaðurin skal skipast

*Á fundi 15. februar 2010 hevur stýrið fyri KSF harumframt samtykt:*

- at avgerðarrætturin eigur at fylgja við málsøkinum – bæði tann fíggjarliga og fyrisitingarligi
  - lógarverkið eigur tí at virða kommunala sjálvræðið soleiðis, at lógarkravd tilboð og rættindi borgarans kunnu skipast og tillagast eftir staðbundna tørvinum og umstøðunum
  - kommunurnar eiga framhaldandi at varðveita rættin til sjálvar at áseta egið skattastig og inntøkugrundarlag annars, eitt nú í mun til brúkaragjøld
  - kommunurnar eiga framhaldandi sjálvar at áseta sítt egna rakstrar- og íløgustøði
- at skipað tilgongd beinanvegin verður sett í gongd til tess at leggja fólkaskúlan og eldrarøktarøkið til kommunurnar at fyrisita
  - børn og ung 0-18 ár
    - kommunurnar fáa betri skipað samanhang og heildartilboð fyri øll børn og ung innan dagstovnar, fólkaskúla, frítíðarskúla, musikkundirvísing, frítíðarvirksemi v.m. eins og barnavernd
    - fólkaskúlin er longu skipaður í rímiliga fastar lógarkarmar
    - metti útreiðslutørvurin komandi 10 árini skal gerast við støði í verandi virksemi og ætlaðum menningarátøkum ella broytingum, ið kommunurnar skulu gjalda
    - støða eigur at verða tikin til, hvørjir innihaldsligir partar av fólkaskúlaøkinum ítøkiliga verða lagdir til kommunurnar, herundir eitt nú hvussu verður við sernámsfrøðiligi økinum, sum møguliga kann skipast við landsfevnandi felagskommunalum samstarvi
  - eldrarøkt
    - neyðugir lógarkarmar fyri eldrarøktarøkið sum heild skulu gerast sum skjótast
    - grundarlag at byggja út fjølbroytt og fjøltáttað búpláss og røktartænastutilboð skal fáast til vega
    - metti útreiðslutørvurin komandi 10 árini skal gerast við støði í verandi virksemi og ætlaðum menningarátøkum ella broytingum, ið kommunurnar skulu gjalda
    - støða eigur at verða tikin til innihaldslig markamót við heilsuverkið o.a.
    - onnur málsøkið, sum kunnu leggjast til kommunurnar, eiga eisini at verða tikin við í tilgongdina
- at afturberingarskipanin, sum skotin verður upp í álitinum, eigur at verða skipað so skjótt, at fyrsta stóra økið verður lagt til kommunurnar
  - afturberingarskipanin er solidarisk fyri allar kommunur
  - afturberingarskipanin javnar stóran part av teimum ójavnum, sum eru í skattainntøkugrundarlagnum
  - afturberingarskipanin er tí fortreyt fyri samlaðu kommunalu fíggingini framyvir
  - afturberingarskipanin kann fíggja uml. 250 mió kr.
- at skattabýtið millum land og kommunur av lønarskattinum eftir verandi progressiviteti eigur at verða broytt til tess at fíggja lógarbundnar uppgávur, sum verða lagdar til kommunurnar, men sum ikki kunnu fíggjast við afturberingarskipanini
  - til ber at broyta skattabýtið 7% ella uml. 450 mió kr.
- at blokkstuðulsskipan úr landskassanum eigur ikki at verða skipað
  - blokkstuðulsskipan brýtur grundleggjandi við fíggjarliga avgerðarrættin
- at fíggjarlig serskipan skal gerast fyri Sandoyarøkið, so at økið framhaldandi kann verða sjálvstøðug kommunal eind
- at fíggjarlig serskipan skal gerast fyri tær kommunur, sum røkja lógarbundnar uppgávur á útoyggj
- at skipað verður millumkommunal javningarskipan, ið fevnir bæði um inntøkujavning og útreiðslujavning
  - skipanin eigur at vera einføld og gjøgnumskygd
  - skipanin má ikki at darva framburði og vøkstri
  - skipanin eigur í fyrsta lagi at verða sett í verk, tá ið
- kommunali bygnaðurin er komin uppá pláss
- fyrsta stóra málsøkið er lagt til kommunurnar
- afturberingarskipanin er sett í verk
- at øll umskipanartilgongdin eigur at verða gjørd í neyvum samstarvi og samráðing millum land og kommunur
  - tilgongdin og umskipanin skal grundfestast væl politiskt, so at grundarlagið fyri fyrisitingarligu verksetingini er greitt

*Ásannandi, at kommunala umskipanin er stórt politiskt mál, og at full semja neyvan er um allar tættir í umskipanini hvørki millum kommunur, millum land og kommunur ella í landsstýrinum/løgtinginum, fer Kommunusamskipanin framhaldandi av viðgera uppskotið til umskipan á einum so breiðum og demokratiskum grundarlagi sum møguligt.*

*Í hesum sambandi savnast allir kommunustýrislimir í limakommununum til ein evnisdag í Klaksvík 26. februar 2010. Á evnisdegnum verða ymsu tættirnir í ætlaðu kommunalu umskipanini viðgjørdir neyvari. Endamálið er at veita grundarlag fyri felags fatan og felags støðutakan í kommunum til umskipanarætlanirnar.*

*Tórshavn 15. februar 2010*

***Kommunusamskipan Føroya***

*Heðin Mortensen, formaður*
*Tórshavnar kommuna*

*Gunvá við Keldu,*
*næstforkvinna*
*Klaksvíkar kommuna*

*Magnus Rasmussen*
*Runavíkar kommuna*

*Kristin Michelsen*
*Tvøroyrar kommuna*

*Sigurd S. Simonsen*
*Fuglafjarðar kommuna*

*Kirstin Strøm Bech*
*Vágs kommuna*

*Brandur Sandoy*
*Sands kommuna*

# Svar til Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmann

**HERGEIR NIELSEN**
løgtingsformaður



Løgtingsformaðurin og formansskapur tingsins hava viðgjørt kæru tygara, dagfest 23. februar 2010, har tygum boða frá, at tygum á tingfundinum sama dag skuldu vera framsøgumaður í tveimum málum:

1. 1. viðgerð av tingmáli nr. 87/2009: Uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Norðurlandaráðnum í 2009 og um frágreiðing um virki ráðsins í 2009
2. 1. viðgerð av tingmáli nr. 95/2009: Uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Útnorðurráðnum 2009

Kært verður um framsøguviðurskifti tingsins í hesum málum, sum vóru nr. 8 og 9 á skránni.

Sjey tingmál stóðu á skránni undan hesum málum. Tá færri enn seytjan tingmenn vóru á fundi, vóru hesi mál flutt aftur í røðina, til tingið var mannað at viðgera tey, so sum vanligt er.

§ 69 í tingskipanini ásetur, at tá mál kemur til 1. viðgerð, spyr løgtingsformaðurin, áðrenn orðaskiftið byrjar, hvørjir framsøgumenn biðja um orðið. Teir fáa tá orðið eftir floksstødd.

Løgtingsformaðurin umsat skipanina eftir hesum ásetingum og kunnaði harafturat um, at framyvir skuldu framsøgumenn tekna til beinanvegin, um teir annars skuldu fáa talutíð sum framsøgumenn og fáa orðið eftir floksstødd.

Talan var ikki um nakra nýggja skipan, sum tygum siga í kæru tygara, men um eina neyvari handfaring av skipanini, sum formansskapurin hevði samtykt, og sum fráboðað var tinginum undan viðgerðini.

Farið varð undir málsviðgerðina av løgtingsmáli nr. 87/2009, kl. 11.05.

Tá eingin framsøgumaður teknaði til fyri Tjóðveldi 1. ferð, fekk Tjóðveldi onga framsøgurøðu 1. ferð, (20 min.), og tá Tjóðveldi í seinnu umførunum hvørki teknaði til 2. ferð, (10 min.), ella 3. ferð, (5 min.), fekk Tjóðveldi onga framsøgurøðu í hesum umførum heldur.

Farið varð undir málsviðgerðina av løgtingsmáli nr. 95/2009 kl. 13.44, og tá somu viðurskifti tóku seg upp í hesum máli, útihýsti Tjóðveldi seg eisini sjálvt frá hesi viðgerðini.

Tað er tí ikki rætt, sum tygum siga, at størsti flokkur á tingi ikki slapp at flyta fram síni sjónarmið.

Talan er ikki um óvanliga ódemokratiska framferð frá tingsins síðu, og heldur ikki fatar formansskapurin seg um nakra juntu, ið stjórnar við dekretum, sum ikki eru fráboðað ella sett í verk í øðum verkum. Talan er tvørturímóti um greiðar umsitingar av tingsins reglum, so sum tær eru ásettar í tingsins skipan.

# Bispurin og tær fimm konurnar

**NICOLINA JENSEN BEDER**



Peter O. K. Olofson. Missionær, viceforstander på Chuo cha Theologia, Mlimani Sumbawanga, Tanzania. Soleiðis ljóðaði yvirskriftin

Eg gjørdist rættiliga kløkk og hugsaði við mær sjálvum, nei, nei, er Jógvan bispur nú farin at taka Bíbliuna so bókstaviliga, at hann er farin at kappast við kong Dávid? Nei, so galið var tað ikki.

Eftir skrivinum at døma, er Olofson einki broyttur, síðani hann stríddist ímóti teim kvinnuligu prestunum. Olofson skrivar víðari: »Eg haldi, at vit eiga at hugsa okkum um, og lata Guds Orð avgera. Lata vit ikki Guds Orð avgera fyri okkum, so seta vit okkum í Guds stað, og tá er vandi á ferð«.

Jú men er hetta ikki júst tað, ið Olofsen ger: »Vit kunnu framvegis lesa Jesu orð í Bíbliuni: Hvør tann, ið skilst við konu sína og giftist við eini aðrari, drívur hor; og hvør tann, sum giftist við konu, ið skild er frá manninum, drívur hor (Luk. 16,18). Um onkur vil stoyta Jesus frá sær, tí hann sigur hetta, so er tað teirra avgerð og ábyrgd. Eg havi ikki myndugleika til at seta orð Jesusar úr gildi, og eg kenni heldur ikki nakað menniskja, sum hevur tað«.

Mær vitandi hevur Jesus einki skrivað. Olofson vísir sjálvur til Lukas, hví sigur hann tá, at tað er Jesus? Um Jesus havi eg bert funnið, at hann skrivaði við fingrinum niður í jørðina, aftaná at hann hevði svarað teimum, ið vildu fella hann við spurningunum um konuna, ið var tikin í hordómi. Svarið, hann gav teimum, var: »Tann av tykkum, sum syndaleysur er, kasti fyrsta steinin á hana«. Johs. Kap 8, v.7-8.

Ein vinmaður, ein sera hugnaligur maður, ið dámdi væl at tosa um dagsins mál, tað verði seg úr bløðunum ella útvarpinum, hevði eitt orðatak, tá ið hann helt eitthvørt vera heilt burturvið. Tá segði hann stutt og greitt "Piss og kanel". Tað kendist løgið, tá ið eg hevði lisið tað, ið Olofson hevði skrivað. Tá hoyrdi eg fyri mær sama orðatakið.

Ofta verður víst til Bíbliuna fyri at undirstrika, at tað, sum ein sigur, er satt. Bíblian er skrivað soleiðis, at vit til eina og hvørja tíð kunnu finna eitthvørt, ið vit kunnu brúka ímóti okkara næsta. Ofta verður tikið til Paulus. Har er ikki nógv at finna um javnstøðu, sum annars er høgt í metum í dag. Paulus sigur fleiri ferðir: Eg vildi ynskt, at tit vóru sum eg, tað vil siga ógiftir.

Somuleiðis sigur hann, at kona skal tiga í kirkjusamkomununum. 1.Kor. 14,34-35. Eisini sigur hann: Men eg gevi ikki kvinnu loyvi til at vera lærari ella at taka sær ræði av manninum, men at vera í kvirri. 1.Tim.2,12. Lesa vit Gl. Testamenti er ikki mætari, tá er kvinnan mett sum ein býtisvøra.

Sjálvt um vit ikki eru samd við Paulus ella Gl. Testamenti, ber væl til at liva eitt kristiligt lív í sátt og semju.

*Tórshavn 22. februar 2010*

